# Vestmanna bjørgini – ein stórfingin uppliving



Siglt verður millum steyrætt forberg og drangar

**Í ár eru liðin 20 ár síðan Palli Lamhauge í Vestamanna byrjaði við skipaðari sigling undir Vestmannabjørgini. Nógv ferðafólk, bæði føroyingar og útlendingar, nýta høvið at njóta hesa stórfingnu uppliving**

FERÐAVINNA
*Magnus Gunnarsson*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

At sigla undir Vestmannabjørgini er ikki nakað nýtt fyribrigdi. Bæði í 40 og 50-unum bleiv siglt við bátum hesa farleið við ferðafólki. Henda sigling vant alt meira upp á seg. Í ár eru liðin 20 ár síðan Palli Lamhauge í Vestmanna fór undir skipaða sigling undir Vestmannabjørgini.

Seinasta mikudag vóru vit ein túr undir Vestmannabjørgunum við feðgunum Palla og Jákup Andreasi Lamhauge. Vit fóru við bátinum Silju, sum er góðkendur til 25 ferðafólk. Veðrið var gott, og báturin var fullsettur av føroyskum og útlendskum ferðafólki. Fyrst varð siglt yvir móti Slættanesi í Vágum, har báturin legði stilt og Palli segði ferðafólkunum frá um bygdina, sum seinastu fastbúgvandi fólkini fluttu frá í 60-unum. Nú verða húsini brúkt sum summarhús.

Síðan bleiv siglt undir Vestmannabjørgini, hesi stórfingnu høgu fuglabjørgini, har siglt verður millum fuglabjørgini og drangarnar, báturin føldist sera lítil millum hesi steyrrættu bergini. Av trygdarávum skuldu øll, ferðafólk og manning, hava hjálm á høvdinum. Meðan vit sigla har, sigur Palli frá, um alt tað vit síggja og um søguligu bakgrundina. Palli dugir sera væl at siga frá og at fáa ferðafólkini at føla seg væl. Siglt verður inn í grotturnar, tað minnir mest um at sigla við spøkilsisbátunum í Tivoli, ein veit ikki hvat tað næsta verður. Ein fantastisk uppliving, bæði fyri føroyingar og útlendingar. Tann sum bert hevur sæð myndir ella filmar frá Vestmannabjørgunum, kann ikki ímynda hvussu stór hendan uppliving í veruleikanum er, tað má upplivast. Á veg móti Vestmanna aftur serveraði Palli kaffi til ferðafólkini. Tey ferðafólk sum vitja okkara land og fara avstað aftur uttan at hava verið ein túr undir Vestmannabjørgunum, hava veruliga "forsømt" seg.

Palli hevur siglt við nógvum kendum persónum, sum t.d. Kronprins Frederik, Sissel Kyrkjebø, Kim Larsen, Jesper Klein, íslendska forsetanum, borgarstjóranum í Stockholm, fyri at nevna nakrar. Eisini hevur hann fingið takkarbrøv frá t.d. fyrrverandi danska forsætisráðharranum Poul Nyrup Rasmussen, eftir at hann hevði verið undir Vestmannabjørgunum, Mykinesi og í Tindhólmi. Palli fekk eisini takkarbræv frá manningini á oljuboriskipinum Vest Navion, eftir at teir høvdu eitt gott arbeiði fyri teir. Palli sigur, at hann hevur ikki so lætt við at kenna fólk aftur, men tað eru nógv sum kenna hann aftur og heilsa. Tá Palli í fjør, saman við øðrum, var í Hannover í Týsklandi í sambandi við ein fótbóltsdyst, stóðu teir og ótu pylsir uttanfyri stadionøkið, tá kom ein dani og heilsaði uppá hann. Hesin danin hevði stutt frammanundan verið í Føroyum og verið ein túr undir Vestmannabjørgunum við Palla.

Á jólum 2002 vóru liðin 40 ár síðan Palli Lamhauge lat upp egnan matvøruhandil í Vestmanna. Í ár eru liðin 20 ár síðan hann byrjaði skipaða sigling undir Vestmannabjørgunum og fríggjadagin 11. juli fylti hann 70 ár.



Vestmannabjørgini eru ein stórfingin uppliving fyri bæði føroysk og útlendsk ferðafólk



Her er Silja á veg inn í eina holu undir Vestmannabjørgunum



Palli Lamhauge dugir sera væl at greiða ferðafólkunum frá tí tey síggja





Anna Maria Simonsen, sum í nógv ár arbeiddi á Landssjúkrahúsinum valdi heldur havið sum arbeiðspláss og er nú við í leitingini eftir olju á landgrunninum

*Mynd Jens K Vang*

Fyrsti føroyski sjúkrarøktarfrøðingurin offshore:

# Eitt øðrvísi og ótrúliga spennandi arbeiði

**Anna Maria Simonsen úr Havn hevur seinastu tvey árini arbeitt í frálandavinnuni – umborð á boripalli og boriskipi – á føroyska landgrunninum og við strond Vesturafrika. Hóast einsamøll kvinna í tí annars so mansdomieraða arbeiðinum, sum oljuvinnan er tað, so dámar henni sera væl og ætlar eisini at vera til havs, á blettinum, tá olja verður funnin við Føroyar. Sosialurin hevur hitt hana**

OLJUARBEIÐI
*Jan Müller*

Tað er rár hending, at føroyingar arbeiða offshore tvs. í frálandavinnuni, her serstakliga umborð á boripallum og boriskipum. Tað er uppaftur meira sjáldsamt, at føroyskar kvinnur eru at finna í slíkum arbeiði úti til havs. Men undantøk eru. Og eitt teirra er Anna Maria Simonsen úr Havn, sum rætt og slætt er vorðin bitin av at arbeiða í hesum annars mannfólkaliga arbeiðsumhvørvinum.

Anna Maria, sum er sjúkrarøktarfrøðingur, hevur hetta seinasta árið arbeitt umborð á boripallinum "Sovereign Explorer" út fyri Vesturafrika. Hesin pallurin er ein gamal kenningur um okkara leiðir. Hann var við til at bora tveir brunnar á landgrunninum, ein fyri Statoil og ein fyri Amerada Hess. Tað var í tí sambandinum, at Anna Maria fekk áhuga fyri at royna hetta nýggja, spennandi og avbjóðandi arbeiðsumhvørvið.

### Fylgdi við til Vesturafrika

Henni dámdi so væl arbeiði sum sjúkrarøktarfrøðingur umborð á boripallinum á føroyska landgrunninum, at hon helt fram umborð, tá boripallurin í august í fjør varð leigaður av fyritøku í Texas at bora fleiri brunnar út fyri Vesturafrika.

Hon var umborð á Sovereign Explorer í Vesturafrika, tá hon fekk tilboð um at koma umborð á Belford Dolphin, sum skuldi bora við Føroyar. Teir skuldu brúka eina sjúkrasystur við danskari autorisatión. Nú hon hevði verið offshore fyrr í Føroyum gjørdi hon av at taka av tilboðnum. Fólk hjá Dolphin Drilling høvdu spurt seg fyri hjá kontaktlæknanum í Føroyum, Pál Weihe. Teir vendu sær síðani til Onnu Mariu, sum segði, at hon hevði áhuga í at vera við aftur í leitingini undir Føroyum. Hon helt tað vera bæði spennandi og mennandi.

Tá teir spurdu um aðra at loysa hana av varð leitað, men eingin varð tøkur og tí komu tey so fram á Tórgerð Klein. Hon hevur ikki verið offshore fyrr men hevur sera góðar royndir við skaðastovuarbeiði og í akuttum arbeiði, sum er góð og hent fortreyt fyri at kunna vera í hesum arbeiðinum.

Anna Maria fór umborð á spildurnýggja boriskipið Belford Dolphin í Las Palmas og fylgdi skipinum til Føroya, har hon so var umbroð ta fyrstu tíðina. Síðani fór Tórgerð umborð og vaktarskifti skuldi so vera aftur fríggjadagin 4. juli.

### Vildi royna nakað nýtt

Men hví tók Anna Maria tað heldur óvanliga stigið at fara umborð á boripall at arbeiða: - Eg hevði verið so mong ár á Landssjúkrahúsinum, at mær tørvaði onkra nýggja avbjóðing. Tað var tá, at hon fór undir at gera uppgávu um tilveruhóttanir hjá sjómonnum á fjarleiðum í sambandi við eina útbúgving innan vinnuheilsusjúkrarøktarøkið. Tað var eitt sera áhugavert arbeiði, eisini tí at uppgávan varð so væl móttikin sigur Anna Maria. Hon er týdd bæði til enskt og spanskt. Eisini varð hon løgd fram á eini ráðstevnu hjá ILO í Las Palmas. Møguleikin stendur so eisini enn opin fyri at gera meira við tað arbeiðið.

Anna Maria sigur, at hon eftir at hava gjørt hesa uppgávuna var sera forvitin at vita, hvussu oljufeløgini arbeiða og hvussu tað er við trygdini umborð á oljupallum. Tvs. hvussu fólkini hava tað umborð og hvør munurin er sammett við tey, sum eru við føroyskum fiskiskipum.

Eftir at hava verið umborð á boripalli fyrstu ferð nakrantíð, í tí aðru boringini á føroyskum øki, við Sovereign Explorer fyri Statoilsamtsakið var Anna Maria vorðin bitin av hes-

*Framhald á næstu síðu*